| **Formula-deildin** | | | **1. deild** | | | **2. deild** | | | **1. deild kvinnur** | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | Dystur | Dómari | 03.06 | TB-B71 | Ransin N. Djurhuus | 05.06 | ÍF-MB | Eugen Voda | 05.06 | B36-EB/S | Ørvur á Lag |
| 05.06 | HB-NSÍ | Petur Reinert | 03.06 | HB-LÍF | Rúni Gaardbo | 05.06 | NSÍ-B68 | Anton Skoradal | 05.06 | AB-HB | Magnus í Króki |
| 05.06 | EB/S-B36 | Páll Augustinussen | 03.06 | AB-VB/S | Jónleif Frederiksen | 05.06 | KÍ-GÍ | Edvard Højgaard | 05.06 | KÍ-NSÍ | Johnleif Gerðisá |
| 05.06 | VB/S-KÍ | Georg N. Rasmussen | 03.06 | FSV04-Royn | Dan Højgaard | 05.06 | Skála-B36 | Bárður Mortensen | 05.06 | GÍ-SÍ | Jóhan B. D. Olsen |
| 05.06 | B68-GÍ | Lassin Isaksen | 03.06 | SÍ-KÍ | Lars Müller | 05.06 | EB/S-Fram | Andrass Weihe | | | |
| 05.06 | ÍF-Skála | Jens Petur Brattalíð | | | | | | | | | |

# EB/Streymur aftur í oddabrak

**Eftir at hava spælt javnt á útivølli móti HB, skal EB/Streymur hesa ferð spæla heimadyst móti B36, ið eisini jagstrar oddasessin**

FÓTBÓLTUR

*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tað er um tað mundið, at fólk av Eiði og har um leiðir verða forvand við oddadystir. EB/Streymur hevur fyrsta triðingin av kappingarárinum hildið seg frammi á oddasessinum, og mánadagin verður enn ein av stóru royndunum í so máta.

Hesa ferð er tað B36, sum kemur á vitjan, og tað kann væl gerast ein uppgerð, ið verður eins trupul, sum hon ið liðið spældi seinasta vikuskifti móti HB. Ikki minst eftir góða úrslitið hjá B36 í Klaksvík.

## Eru væl fyri

Hjá heimaliðnum eru mest sum allir mans tøkir. Tað er tó ivasamt, um evnaríki Arnbjørn Hansen er tøkur. Eftir at hann seinasta sunnudag skeyt annað av málum hjá EB/Streymi móti HB noyddist hann av vøllinum við skaða í lærkrikanum, og hesin skaðin hevur enn hug at arga nakað. Hartil er Leif Niclasen enn ikki komin fyri seg.

Hinvegin styrkir tað um liðið, at Ronnie Samuelsen nú er um at koma heilt fyri seg aftur. Eftir at hava ligið í songini í góða viku, kom víkarmaðurin á vøllin og gjørdist málskjútti móti HB, og einki er at ivast í, at hann er tendraður, nú fyrrverandi liðfelagarnir úr B36 standa sum mótstøðulið.

## Fara eftir øllum

Hjá B36 tykist hópurin eisini at vera so hampuliga væl fyri. Hóast liðið enn má vera Fróða Benjaminsen, Inga Højsted og Berg Midjord fyriuttan, so er tað eitt stórt pluss, at Jákup Mikkelsen og Mikkjal Thomassen nú aftur eru tøkir eftir leikbann.

– Vit fara so til Eiðis eftir øllum trimum stigunum. Sigurin í Klaksvík gav eitt stórt skump rætta vegin. Hóast okkum restaðu fýra landsliðsspælarar og Mikkjal Thomassen, so megnaðu vit at koppa KÍ-liðnum, og tað sigur avgjørt nakað um breiddina í hópinum, sigur B36-liðskiparin, Klæmint Matras undan dystinum.

Klæmint sjálvur hevur annars spælt á miðvøllinum seinastu dystirnar, nú so nógv frávera hevur verið, og tað er ikki óhugsandi, at hann eisini fer at røkja hetta plássið á Eiði.



# B68 kann læra av gøtumonnum

**At tað ber til at venda soltnu gongdini higartil hjá B68 uttan stórvegis útskiftingar, er gongdin hjá GÍ higartil í ár gott dømi um**

B68-GÍ

*Jóannes Hansen*

Tað stendur einki til á Svangaskarði. Úrtøkan burtur úr fyrsta triðinginum av kappingini var fimm stig. Eitt av teimum varð vunnið, tá ið GÍ í 2. umfari vitjaði, og úrslitið gjørdist 1-1. Um B68 úrtøkan í tveimum teimum síðstu triðingunum ikki verður betri, enn hon var í fyrsta triðinginum, og um sammett verður við gongdina í bestu deildini í fjør, so er eingin ivi um, at B68 fer at flyta niður.

Á Toftum siga teir seg ikki hava mist mótið. Teir halda, at hugburðurin og avrikini hava verið á rættari leið seinastu ferðirnar, hóast talan hevur verið um tepur tap á heimavølli móti HB og á Skála.

B68 saknar fleiri spælarar hesa ferð. Arnbjørn Danielsen, Alex Troleis og Magnus Jakobsen eru skaddir, Øssur Hansen verður burturstaddur inntil fyrst í næstu viku, og Ralph van Dooren er leikbannaður.

Gestirnir á Svangaskarði 2. hvítusunnudag, GÍ, eru gott dømi um, at tað ber til at venda gongdini, hóast talan ikki er um stórar útskiftingar. Í fjør hekk GÍ í vatnskorpuni. Í ár eru teir við umleið sama fólkinum við í FM kappingini. Orkan er størri, og hugburðurin er betri.

GÍ hevur fingið stig seks tær seinastu ferðirnar. B68 hevur einki stig fingið seks tær seinastu ferðirnar.

Hjá GÍ er Símun Louis Jacobsen leikbannaður, og Hans Pauli Petersen og Poul Ennigarð eru framvegis langtíðarskaddir. Í landskappingardystinum móti VB/Sumba sunnudagin vóru fleiri skiftingar gjørdar, um sammett verður við fjórðingsfinaluna móti KÍ hósdagin í síðstu viku. Tað ber boð um, at kappingin er stór um plássini.

# Dalbúð aftur í Fuglafirði

**ÍF fær góðan styrk, og á Skála hava teir fingið blóð aftur á tonna eftir tveir sigrar, og nú tykist tað manningarliga at síggja betri út**

ÍF-SKÁLA

*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Báðir partar halda seg vera væl fyri undan oyggjauppgerðini í Fuglafirði, sum sambært skipanini ikki verður á skránni fyrrenn týskvøldið. Bæði í Fuglafirði og á Skála stendur tað frískt í huganum, at ÍF næstsíðsta týskvøld vann 2-1 á Skála.

Síðani tá hevur Skála vunnið fjórðingsfinalu móti NSÍ og í landskappingini móti B68. Tað hevur givið teimum mót um, at tað fer at bera til, hóast tað higartil hevur kenst tungt.

Í Fuglafirði er ein nýggjur maður í hópinum hesa ferð. Tað er 20 ára gamli Hjalmar Dalbúð, sum í vikuni hevur vant við ÍF. Hann hevur higartil spælt í Runavík, har hann ikki hevur fingið møguleikan á besta liðnum. Nú roynir hann eydnuna í barndómsfelagnum hjá pápanum, Meinhardti Dalbúð, sum var ein av bestu ÍF spælarunum í mong ár.

Harafturat verður nýggjur maður í ÍF málinum móti Skála. Tað er ungverjin Andras Gango, sum móti Skála fer at loysa Karstin Joensen av. Karstin hevur fyri langari tíð síðani boðað frá, at hann hevur ikki stundir at spæla. Úr Fuglafirði frættist, at teir arbeiða við at fáa útlendskan styrk til bæði verjuna og álopið, men enn er ov tíðliga at siga nakað meiri um hetta.

Sunnudagin noyddust tríggir skálamenn av vøllinum, tá ið B68 vitjaði á Skála. Vlada Filipovic er tøkur aftur, eftir at hann bekláði sunnudagin. Arnholdt Berg fór av vøllinum orsaka av vøddaskaða. Hann hevur vant eitt sindur, og tað hevur Pauli G. Hansen eisini, eftir at hann sunnudagin varð útskiftur orsaka av sparki í tjúkkan. Tað verður roknað við og vónað, at teir báðir verða við týskvøldið.

Hjalmar Dalbúð er komin úr NSÍ og til ÍF. Ein liðfelagi hansara, Jóhan Troest Davidsen, er farin úr NSÍ og yvir á Skála. Týskvøldið verða teir báðir mótstøðumenn, um Jóhan verður komin fyri seg, eftir at hann seinnapartin av vikuni hevur verið sjúkur. Á Skála verður roknað við, at Jóhan verður tøkur týsdagin. Tað er eisini møguleiki fyri, at Alexandur Johansen verður á dómaraseðlinum. Eftir langan skaðasteðg hevur hann vant eitt sindur í hesi vikuni. venur spakuliga týsdagin.

**formuladeildin**

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 EB/S | 10 | 6 | - | 3 | - | 1 | 21 | 11 | 10 | 21 |
| 2 GÍ | 10 | 5 | - | 4 | - | 1 | 17 | 9 | 8 | 19 |
| 3 B36 | 10 | 5 | - | 4 | - | 1 | 13 | 9 | 4 | 19 |
| 4 HB | 10 | 5 | - | 3 | - | 2 | 26 | 14 | 12 | 18 |
| 5 NSÍ | 10 | 5 | - | 3 | - | 2 | 21 | 12 | 9 | 18 |
| 6 KÍ | 10 | 4 | - | 5 | - | 1 | 18 | 10 | 8 | 17 |
| 7 Skála | 10 | 2 | - | 2 | - | 6 | 12 | 13 | -1 | 8 |
| 8 ÍF | 10 | 2 | - | 0 | - | 8 | 12 | 28 | -16 | 6 |
| 9 VB/S | 10 | 2 | - | 0 | - | 8 | 9 | 32 | -23 | 6 |
| 10 B68 | 10 | 1 | - | 2 | - | 7 | 8 | 19 | -11 | 5 |

| 1. deild menn | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B71 | 10 | 8 | - | 1 | - | 1 | 52 | 11 | 41 | 25 |
| 2 LÍF | 10 | 7 | - | 3 | - | 0 | 27 | 9 | 18 | 24 |
| 3 AB | 10 | 7 | - | 1 | - | 2 | 26 | 11 | 15 | 22 |
| 4 FSV04 | 10 | 6 | - | 1 | - | 3 | 21 | 10 | 11 | 19 |
| 5 TB | 10 | 5 | - | 2 | - | 3 | 18 | 18 | 0 | 17 |
| 6 HB | 10 | 4 | - | 2 | - | 4 | 34 | 21 | 13 | 14 |
| 7 SÍ | 10 | 4 | - | 1 | - | 5 | 25 | 28 | -3 | 13 |
| 8 KÍ | 10 | 2 | - | 1 | - | 7 | 17 | 38 | -21 | 7 |
| 9 VB/S | 10 | 1 | - | 0 | - | 9 | 7 | 49 | -42 | 3 |
| 10 Royn | 10 | 0 | - | 0 | - | 10 | 5 | 37 | -32 | 0 |